# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, um kvøldið minni vindur. Stundum regn ella mjørki og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, seinnapartin minni vindur. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eystri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 16 stig.**

# Summartónar 2008 seta dám á komandi vikuna



**Frá týsdegnum 1. juli, og eina viku fram, fara summarlættir tónar at seta dám á ymsastaðni í Føroyum, tí tónleikastevnan Summartónar 2008 byrjar nevniliga í morgin, 1. juli.**

**SUMMARTÓNAR**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Summartónar fara aftur í ár at seta dám á føroyska summarið. Summartónar er stevna fyri klassiskan tónleik, og - sum tað eitur í skránni – contemporary music.

Summartónar hava í mong ár verið partur av ljósu tíðini í Føroyum. Mótvegis so mongum øðrum tiltaki, so røkka Summartónar út um miðstaðarøkið, og útjaðarin fær sín lut í spælda tónleikinum.

Tað er Felagið fyri Føroysk Tónaskøld og Norðurlandahúsið, ið skipa fyri hesi tónleikastevnuni.

**Summartónar 2008**

Summartónar 2008 byrja í morgin, 1.juli. Skráin, sum er løgd út á kunningarstovur og onnur almenn støð, er spennandi og fevnir eisini víða.

Fleiri frumframførslur eru á skránni í ár. Føroysk tónaskøld eiga 15 av frumframførdu verkunum, og útlendsk tónaskøld eiga 9 av verkunum.

Byrjað verður týsdagin 1. juli við konsert í Klæmintsgjógv frá klokkan 13 til 18.. Har spælir trombonleikarin Dávur Juul Magnussen verk eftir Timothy Cooper, ið nevnist Consequences.

Í Trongisvágs Skúla verður konsert klokkan 20:00 við Rebeccu Persson (sopran) og Birgittu Schnakenburg (klaver). Á skránni eru verk eftir Schierbeck, S. Rasmussen, K. Blak, P.í Sandagerði og C. Nielsen.

Í skúlanum í Nólsoy framførir Carmen Flamenco klokkan 20:00. Maria del Carmen Alvarez Jurado er dansari og tónleikarar eru Juan Hernando Celi og Francisco de Paula Luna Garcia.

Sosialurin fer hesa vikuna framhaldandi at skriva um tað, sum Summartónar hava at bjóða.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 15 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 23 |
| London | 24 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 26 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 25 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 25 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 35 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 999 hPa. við Føroyar fer norðureftir og grynnist.



**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer í landnyrðing og dýpist. Tað gevur nógvan vind og avfall á okkara leiðum týsdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/06 kl. 06⁰⁰ – 10/06 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juni: -9,9° - Mesti hiti máldur í juni: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 09/06 kl. 06⁰⁰ – 10/06 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juni: 21 mm




Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

26. juni — Seinna kvarter
1. juli — Mánin næstur jørðini
3. juli — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. juni | 4:28 | 16:56 | 3:28 | 15:56 | 3:43 | 16:11 | 6:28 | 18:56 | 7:28 | 19:56 | 2:43 | 15:11 | 1:43 | 14:11 | 4:43 | 17:11 | 5:43 | 18:11 | 4:13 | 16:41 | 5:28 | 17:56 |
| 1. juli | 5:26 | 17:56 | 4:26 | 16:56 | 4:41 | 17:11 | 7:26 | 19:56 | 8:26 | 20:56 | 3:41 | 16:11 | 2:41 | 15:11 | 5:41 | 18:11 | 6:41 | 19:11 | 5:11 | 17:41 | 6:26 | 18:56 |
| 2. juli | 6:28 | 19:00 | 5:28 | 18:00 | 5:43 | 18:15 | 8:28 | 21:00 | 9:28 | 22:00 | 4:43 | 17:15 | 3:43 | 16:15 | 6:43 | 19:15 | 7:43 | 20:15 | 6:13 | 18:45 | 7:28 | 20:00 |
| 3. juli | 7:31 | 20:02 | 6:31 | 19:02 | 6:46 | 19:17 | 9:31 | 22:02 | 10:31 | 23:02 | 5:46 | 18:17 | 4:46 | 17:17 | 7:46 | 20:17 | 8:46 | 21:17 | 7:16 | 19:47 | 8:31 | 21:02 |
| 4. juli | 8:31 | 21:00 | 7:31 | 20:00 | 7:46 | 20:15 | 10:31 | 23:00 | 11:31 | - | 6:46 | 19:15 | 5:46 | 18:15 | 8:46 | 21:15 | 9:46 | 22:15 | 8:16 | 20:45 | 9:31 | 22:00 |